## Pedagogar til barnagarðin við Kráir í Hvalvík

Søkt verður eftir pedagogi til barnagarðin at byrja 15. februar 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Størvini at søkja eru:**
Pedagogur til barnagarðin 30 t/v. og ella, vøggustovu 30 t/v.

Barnagarðurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum, 1 vøggustovu og eini smábarnastovu.

Barnagarðurin liggur í hugnaligum, barnavinarligum umhvørvi heilt oman til ta vælkendu stóru ánna.

**Vit ynskja:**
- At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu.
- At tú hevur hug til at skapa og seta dám á okkara barnagarð.
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvsstøðugt.

**Setunarviðurskifti:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Nancy Poulsen, leiðara, á tlf. 772021 ella 422717.

Umsóknir við avritum av prógvi verða at senda til:
**Barnagarðin við Kráir**
Fo - 430 Hvalvík.
mail: nosi@post.olivant.fo

Umsóknarfreistin er í seinasta lagi tann **04.02.08**

## Eysturoyar Røktar-og ellisheim

### Søkt verður eftir
- **sjúkrarøktarfrøðingum,**
- **heilsurøktarum/sjúkrahjálparum**
- **heilsuhjálparum**

at byrja 14. februar 2008 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðsbrøkur 0,70 tíð

Stórur dentur verður lagdur á, at trivnaður bæði fyri búfólk og starvsfólk framvegis eyðkennir heimið og vænta vit tí av tær, at tú hevur áhuga og gleði við, at samskifta við eldri fólk og at tú hevur vilja og eginleikar at samskifta við starvsfólk og avvarðandi.

Vit kunna bjóða tær eitt arbeiðsumhvørvi, har virðing fyri tí einstaka er í hásæti og har møguleikin í stóran mun er fyri, at fáa tillagað tíni arbeiðsynski.

Lønar og setanarviðurskifti eru sambært galdandi sáttmálar.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til fyristøðumannin á tlf. 478200 ella 478203

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi , viðmælum v.m. skulu sendast til:

Eysturoyar Røktar-og ellisheim
Att: fyristøðumaðurin
Friðartún
620 Runavík

Umsóknarfreist 11.02.2008

**Eysturoyar Røktar-og ellisheim**
**Friðartún 1 · 620 Runavík**

# Hallarvørðir

**Vegna farloyvi søkir Vágs Ítróttarráð eftir 2 hallarvørðum til Ítróttarhøllina í Vági í fyribils 1 ár.**

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- At røkja høllina og økið uttanum
- At røkja fótbóltsvøllin og økið uttanum
- At gera umvælingar
- At ljós, hiti, luftreinsan og sanitetsviðurskifti eru í lagi
- At halda reint og ruddiligt inni og uttan um høllina
- At gera reint í høllini og felagshølum annars
- At hava ábyrgd av hallarleiguni/hallartímum
- At hava samskifti við tey, ið brúka høllina

**Førleikakrøv**
Tú skalt duga at arbeiða sjálvstøðugt, vera røkin og hava góð samstarvsevni

**Starvs-og setanarviðurskifti**
Størvini eru ¾ størv við skiftandi arbeiðstíðum og verða sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Vágs Ítróttarráð á tlf. 373459

**Umsókn**
Við upplýsing um útbúgving, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal sendast til Vágs Ítróttarráð, postsmoga 5, 900 Vágur í seinasta lagi fríggjadagin 8. februar 2008.

Sosialurin -har tað hendir

# TRØÐ Í PORKERI TIL SØLU

Um hóskandi boð fæst verður við hesum trøðin matr.nr. 215, Porkeri, ið er til víddar 9.575 m², lýst til sølu.

Áhugaði kunnu venda sær til Petur Even Djurhuus, advokat, ped@lawfirm.fo ella skrivaran kt@lawfirm.fo

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TORMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

## Kommunustýrisfundir hjá Sands Kommunu í 2008

| | | |
|---|---|---|
| Mánadagin | 11. februar | kl. 17.00 |
| Mánadagin | 03. mars | kl. 17.00 |
| Mánadagin | 02. apríl | kl. 17.00 |
| Mánadagin | 19. mai | kl. 17.00 |
| Mánadagin | 16. juni | kl. 17.00 |
| Mánadagin | 25. august | kl. 17.00 |
| Mánadagin | 22. septembur | kl. 17.00 |
| Mánadagin | 27. oktobur | kl. 17.00 |
| Mánadagin | 24. novembur | kl. 17.00 |
| Mánadagin | 15. desembur | kl. 17.00 |

SANDS KOMMUNA
...trygd og trivnaður fyri øll

Mørkin Mikla 3 - FO 210 Sandur - Tel: 361 034 - Fax: 361 734



Forelskað?

Vís tað í Sosialinum

